

**Blogga:**

# Kiksað at verða einsamøll!

Eg haldi ikki at eg veit um nakran, sum leitar sær á barr einsamøll. Spurningurin er so, hví gera vit ikki tað ? hvat er so kiksað við at fara einsamøll á barr, at tað nærum aldrin kemur fyri?

Við hesum spurningunum í huga fór eg einsamøll á eina barr í Havnini, men sjálvsagt við einari bók í taskuni, eittans fyri at tryggja mær, at tað ikki bleiv alt ov kiksað.

Eg kom inn í barrina, setti meg niður við eitt borð – uttan teldu, bók ella fartelefon í hondini – og hugdi í menu kortið. Keypti mær síðani eina stóra veðr. Heilt erligt, hvat er verri enn ein einsamøll kvinna á einari barr við einari STÓRARI VERÐ? Men fyri at mítt eksperiment skuldi rigga, so noyddist eg at keypa veðr, tí onkursvegna er tað ok at drekka kaffi einsamøll – men øl, mega kiksa.

Fólk komu inn, og eg føldi bara hvussu tey hugdu eftir mær, og ímyndaði mær at tey hugsaðu "hví er handan gentan einsamøll ? hevur hon ongar vinir?". Allarhelst bara tvangstankar, men hóast alt byrjaði eg at blíva reyð í andlitinum, og flóv yvir, at fólk skuldi halda, at eg ongar vinir hevði. Aftaná ein góðan tíma MÁTTI eg taka mína bók fram, tí tá vóru alt ov nógv fólk komin á barrina, og eg føldi meg veruliga sum ein tapara! Skilji í veruleikanum ikki hví, men tað er okkurt kiksað við at sita einsamøll og drekka øl við sær sjálvum, meðan øll onnur á barrini hava onkran at práta við.

Tað hevði annars verið feitt um tað var púra náttúrligt at fara á barr einsamøll. Ímyndi tykkum hvussu deiligt tað hevði verið, um man aldrin noyddist at bíða eftir vinkonunum, ella sita heima tí vinkonurnar Akkurát Tann Dagin skuldi hygga sær saman við sjeikinum ? Tað hevði verið lekkurt, men mín niðurstøða er tann, at tað er barasta for kiksað at sita "ene og alene" við sínari øl, tó við nøkrum undantøkum sum til dømis við einari teldu ella kanska einari skúlabók?

---



## Skráin fyri Rás 2

### Hósdagur 22. jan.

15:00 Tíðindi
15:10 Rock-balladir
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
21:00 Orð á leiðini
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 23. jan.

07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsendingin
10:05 Morgunsendingin
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Vikuskiftissending
16:00 Tíðindi
16:05 Vikuskiftissending
17:00 Tíðindi
17:15 Vikuskiftissending
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Leygardagur 24. jan.

07:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e)
14:00 Vinnurasin (e) – Jan Müller leggur til rættis
15:00 Vinstra Víkiskilda – Barbara og Tjóðhild
16:00 Vinstra Víkiskilda
17:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Andrew Djurhuus og Heine Lutzen leggja til rættis
00:00 Liðugt

### Sunnudagur 25. jan.

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e) – Evni: Missiónsvikur. Frants Jensen leggur til rættis
11:00 Tónleikur
11:30 Á Torginum (e)
13:00 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Kelduvaðið
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

RÁS
...títt radio




## Morgunsendingin

### – fríggjamorgunin kl. 11.05

Jóhan Petur Johannesen, lærari er gestur. Hann greiðir frá tíðini hann var við "Mercy Ships"